Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 225 - 21. november 2008

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Seks menn neyðtóku meg. Tá teir vóru lidnir, tveittu teir meg í eina grøv. Har skuldi eg doyggja*

*kvinna í DL Kongo*

## Dómari krevur fimm fangar út úr Guantanamo

**Fyri fyrstu ferð hevur ein sivilur dómstólur í USA kravt, at fangar í Guantanamo-leguni skulu latast leysir**




*Sambært dómaranum Richard Leon eiga í hvussu er fimm menn at sleppa úr Guantanamo-leguni beinanvegin*

*Mynd: AP*

Richard Leon, dómari, sigur í sínum úrskurði, at fimm menn úr Algeria, sum hava verið fangar í Guantanamo-leguni í sjey ár, skulu latast leysir. Hetta er tann fyrsti úrskurðurin av hesum slagnum, síðani amerikanski hægstirættur fyrr í ár staðfesti, at fangarnir í Guantanamo hava rætt til at leggja síni mál fyri sivilar dómstólar í USA til støðutakan.

Politiskir eygleiðarar í USA siga sambært AP, at úrskurðurin hjá Richard Leon, dómara er eitt bakkast fyri stjórnina hjá George W. Bush, forseta, sum skipaði fangaleguna í Guantanamo aftan á yvirgangsatsóknina 11. september í 2001 og innrásina í Afghanistan.

Í úrskurðinum skrivar Richard Leon, at myndugleikarnir hava ikki lagt fram haldgóð prógv fyri, at teir fimm menninir hava tilknýti til al-Qaeda, ella at teir ætlaðu sær til Afghanistan at berjast ímóti teimum amerikonsku hermonnunum har. Dómarin vísir eisini á, at upplýsingarnar, sum myndugleikarnir hava ímóti teimum fimm monnunum, eru frá einari einstakari keldu, sum harafturat er ónevnd.

Málið, sum varð lagt fyri Richard Leon, snýr seg um seks menn, men um tann sætta sigur dómarin, at tað er rætt at hava hann í varðhaldi, tí prógvini ímóti honum eru nóg góð.

Amerikansdka stjórnin hevur møguleika at kæra avgerðina hjá Richard Leon, dómara. Sjálvur hevur dómarin mælt myndugleikunum frá at royna málið aðrastaðni. Eftir hansara tykki hava teir fimm menninir verið í varðhaldi uttan fellandi prógv í sjey ár, og at teir hava rætt til at sleppa heim aftur nú.

## Suðurafrika leggur trýst á Robert Mugabe

**Suðurafrika vil nú hava eina loysn á politisku trætuni millum stýrið hjá Robert Mugabe og andstøðuna í Zimbabwe**



*Robert Mugabe og suðurafrikanski forsetin, Kgalema Motlanthe (høgrumegin), draga nú hvør sína línu*

*Mynd: AFP*

Zimbabwe fær ikki meiri búskaparhjálp úr Suðurafrika, fyrr enn stýrið hjá Robert Mugabe, forseta og andstøðuflokkurin MDC hava tikið samráðingarnar um at skipa eina savningarstjórn uppaftur.

So greið eru boðini frá suðurafrikonsku stjórnini, og hetta er eftir øllum at døma fyrstu ferð, at eitt land í syðra parti av Afrika brúkar revsitiltøk fyri at leggja trýst á Robert Mugabe. Suðurafrikanska stjórnin segði í gjár, at tann politiska kreppan í Zimbabwe hevur gjørt støðuna hjá tí vanliga fólkinum uppaftur verri, enn hon var frammanundan.

Robert Mugabe og leiðslan í flokki hansara ZANU-PF hava játtað at fara á fund við umboð fyri andstøðuflokkin MDC í næstu viku. Fundurin verður í Suðurafrika.

Tann 15. september samdust Mugabe og andstøðan um at býta valdið sínamillum, men síðani er einki komið burturúr. Politiskir eygleiðarar siga, at Robert Mugabe liggur í buktini, tí hann vil hava eina grundlógarbroyting, sum gevur forsetanum heimild til at skipa stjórn. Tað vil andstøðan undir ongum umstøðum góðtaka.

### Havísurin nærkast landi

Fylgisveinamyndir vísa, at havísurin í Grønlandsfjørðinum er farin at nærkast Íslandi. Myndir, sum fylgisveinar tóku í gjár, vístu, at tá var havísurin 50 fjørðingar úr Straumnesi, sum er á útnyrðingshorninum í Íslandi. Íslendska veðurstovan hevur tí ávarað um, at einstakir ísflakar kunnu reka inn á fiskileiðirnar úti fyri Vestfirðum.

Veðurstovan sigur í einari fráboðan, at skip, sum sigla úti fyri Vestfirðum, eiga at vera varin, tí hóast sjógvurin er rættiliga lýggjur, og hóast havísurin er langt úr landi, kunnu einstakir ísflakar reka inn ímóti landi. Sambært veðurstovuni liggur sjóvarhitin úti fyri Vestfirðum millum fýra og fimm stig í løtuni.

**STUTT SAGT**

### Brown nógv styrknaður

Tað er skjótt hvønn vegin í bretskum politikki. Fyri stuttum skrivaðu teir flestu bretsku fjølmiðlarnir, at forsætisráðharra-dagarnir hjá Gordon Brown vóru farnir at fækka, og at formaðurin hjá teimum konservativu, David Cameron, stóð bara og bíðaði eftir skiftinum.

Fjølmiðlarnir bygdu hetta á meiningakanningar, sum vístu, at arbeiðsaraflokkurin hjá Brown var farin langt aftur um tann konservativa andstøðuflokkin.

Men støðan er nógv broytt síðani. Ein meiningakanning, sum tíðarritið Time hevur latið gera, vísir, at nú er minni munur á teimum báðum flokkunum. Eftir kanningini hevði tann konservativi flokkurin fingið 40 prosent, var val nú, og arbeiðaraflokkurin hevði fingið 37 prosent.

Hetta merkir, at síðani seinastu kanning er undirtøkan hjá tí konservativa flokkinum minkað sjey prosentstig, samstundis sum undirtøkan hjá arbeiðaraflokkinum er vaksin fimm prosentstig, skrivar Time.

Viðmerkjarin Anatole Kaletsky skrivar í blaðnum The Times, at avgjørda støðan hjá Gordon Brown í sambandi við fíggjarkreppuna hevur styrkt hann og flokkin, meðan David Cameron hevur verið sera friðarligur, síðani kreppan fór at gera um seg.

### Nógv missa arbeiðið

Í síðstu viku boðaðu 542.000 amerikanarar frá, at teir høvdu mist arbeiðið, og sambært Bloomberg News var talið størri, enn serfrøðingarnir høvdu væntað og eisini tað størsta síðani 1992.

Serfrøðingarnir, sum Bloomberg News hevði spurt frammanundan, væntaðu, at 505.000 høvdu mist arbeiðið afturat.

Talið í síðstu viku ber í sær, at nú eru meiri enn fýra milliónir amerikanarar arbeiðsleysir, og so nógvir hava teir ikki verið í tali síðani í desember í 1992.